Løgtingið

Dagfesting: 22. juli 2016
Mál nr.: 16/00235

Løgtingsmál nr. 3/2016: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Hægri barnafrádráttur til smábarnafamiljur)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti
(Hægri barnafrádráttur til smábarnafamiljur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 158 frá 24. desember 2015, verður gjørd henda broyting:

Í § 2, stk. 1 verður 1. pkt. orðað soleiðis: "Persónur, ið er undir fullari skattskyldu sambært reglunum í § 1, stk. 1, nr. 1-5 í skattalógini, og hevur fast tilhald í Føroyum, kann fyri hvørt barnið, ið hann hevur foreldramyndugleikan yvir, draga frá í útroknaða landsskattinum ein barnafrádrátt á kr. 9.200, um barnið er undir 7 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur, og ein barnafrádrátt á kr. 6.500, um barnið er millum 7 og 17 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2017.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælir við hesum til at hækka barnafrádráttin til smábarnafamiljur við børnum undir skúlaaldri, úr 6.500 kr. árliga upp í 9.200 kr. árliga fyri hvørt barnið. Hetta er ein hækking á 2.700 kr. fyri hvørt barnið undir 7 ár, ið er ein vøkstur á heili 42%.

1.1. Orsøkir til uppskotið

Samgongan hevur sett sær málið at fremja átøk, ið millum annað skapa fólkavøkstur og javnari býti av landsins virðum. Eitt av hesum átøkum er at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum.

Nógvar smábarnafamiljur hava trong fíggjarlig kor. Hetta tíðarskeið í lívinum eru bústaðarkostnaður og barnaansingarkostnaður hægst, samstundis sum foreldrini ofta eru lutfalsliga nýggj á arbeiðsmarknaðinum og harvið hava byrjunarløn.

Fyri at eggja enn fleiri barnafamiljum at velja Føroyar sum teirra heimland og fyri at lætta um fíggjarliga hjá verandi smábarnafamiljum verður við hesum lógaruppskoti skotið upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum fyri børn undir skúlaaldri munandi.

Umframt barnafrádráttin í landsskattinum lata kommunurnar eisini barnafrádrátt í kommunuskattinum. Sum er, lata land og kommunur í miðal áleið sama barnafrádrátt, men við hesum lógaruppskoti verður barnafrádrátturin hjá landinum nakað størri enn barnafrádrátturin í kommunuskattinum.

Barnafrádrátturin ger stóran mun fíggjarliga hjá barnafamiljum. Taka vit eitt dømi við eini smábarnafamilju við tveimum børnum undir skúlaaldri og einum í skúlaaldri, og sum býr í kommunu við miðalbarnafrádrátti á 6.350 kr., er samlaði barnafrádrátturin í skattinum í dag kr. 38.550 kr. árliga. Harvið hava tey 38.550 kr. meira árliga at liva fyri um árið, sammett við, um eingin barnafrádráttur var í skattinum.

Fyri somu familju merkir ein hækking á 42% í barnafrádráttinum fyri børn undir skúlaaldri, at familjan fær umleið 44.000 kr. meira at liva fyri um árið, sammett við, um eingin barnafrádráttur var í skattinum, ella 5.400 kr. meira, sammett við í dag.

1.2. Galdandi lóggáva

Eftir galdandi lóg er barnafrádrátturin í landsskattinum 6.500 kr. árliga fyri hvørt barnið millum 0 og 17 ár. Harafturat fáa barnafamiljur barnafrádrátt í kommunuskattinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógarbroytingini er at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum. Mett verður, at barnafamiljur yvirhøvur er tann bólkurin í samfelagnum, sum hevur tað tyngst fíggjarliga. Hækkaði barnafrádrátturin fer tí at tryggja eitt javnari býti av landsins virðum. Lógarbroytingin er eisini eitt av átøkunum hjá samgonguni fyri at skapa varandi fólkavøkstur.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum verður árligi stuðulin frá landinum umvegis skattaskipanina 9.200 kr. fyri hvørt barnið undir 7 ár og 6.500 kr. fyri hvørt barnið millum 7 og 17 ár. Barnafrádrátturin hækkar sostatt 2.700 kr. árliga fyri hvørt barnið, sum er undir 7 ár. Samgongan hevur sett av 12 mió. kr. til endamálið í játtanarkarminum fyri 2017.

Við hækkingini av barnafrádráttinum verður samlaði miðal barnafrádrátturin fyri børn yngri enn 7 ár 15.550 kr. árliga fyri hvørt barnið. Hetta er grundað á, at miðalbarnafrádrátturin hjá kommununum er 6.350 kr. í 2016, og afturat hesum kemur barnafrádrátturin hjá landinum í 2017 á 9.200 kr. árliga.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til ummælis og hoyringar hjá Almannamálaráðnum, Samtaki, Fakfelagssamstarvinum og Vinnuhúsinum. Harafturat hevur lógaruppskotið ligið til hoyringar alment á síðuni www.foroyalandsstyri.fo á undirsíðuni "uppskot til ummælis".

Innkomnu ummælissvar eru viðløgd lógaruppskotinum sum fylgiskjøl. Innkomnu ummælissvarini taka sum heild undir við at hækka barnafrádráttin. Í onkrum av ummælissvarunum varð skotið upp at umorða ein part av lógaruppskotinum smávegis. Fíggjarmálaráðið hevur tikið uppskotið til umorðing til eftirtektar og hevur umorðað part av lógaruppskotinum smávegis í einum føri.

Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið um at hækka barnafrádráttin 2.700 kr. fyri hvørt barnið undir 7 ár fer væntandi at hava við sær, at skattainntøkurnar verða umleið 12 mió. kr. lægri. Nakað av hesum fer óivað útaftur í umferð í samfelagnum sum hægri nýtsla, tí fleiri smábarnafamiljur hava sera lítlan tiltøkupening, sum er. Lagt er kortini ikki upp fyri, at inntøkurnar av meirvirðisgjaldi ella øðrum umsetningsgjøldum fara at hækka av uppskotinum í játtanarkarminum fyri 2017 ella seinni ár. Samgongan hevur sett 12 mió. kr. av til endamálið í játtanarkarminum fyri 2017.

Við hækkaða barnafrádráttinum lækkar skatturin hjá smábarnafamiljum. Hetta betrar kappingarføri landsins um at fáa fólk til Føroya og kann skapa meira virksemi og avleiddar inntøkur til land og kommunur.

Í sambandi við at seta broytingarnar í verk til 1. januar 2017, verður neyðugt at tillaga KT-skipanir, sum verða brúktar til umsiting av barnafrádráttinum. Hetta er neyðugt, tí verandi KT-skipanir eru ikki førar fyri at umsita ymiskan barnafrádrátt fyri børn undir 7 ár og millum 7 og 17 ár. Tillagingarnar í KT-skipanum eru mettar at kosta umleið 450 tús. kr. Neyðugt verður at játta hesa upphædd í eykajáttan í heyst til TAKS, sum skal rinda fyri at fáa KT-skipanirnar tillagaðar. Hendan upphæddin til tillaging av KT-skipanunum skal bara játtast einaferð og verður ikki ein afturvendandi játtan. Árligi raksturin av KT-skipanunum verður væntandi óbroyttur.

Lógarbroytingin fær væntandi ongar beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur. Tó kunnu óbeinleiðis jaligar fíggjarligar ávirkanir vera á kommunurnar, av tí at smábarnafamiljur fáa betri fíggjarligt rásarúm.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri landið ella landsmyndugleikar. Tó verður neyðugt at játta umleið 450 túsund kr. eyka til TAKS fyri at fáa KT-skipanir tillagaðar, soleiðis at til ber at umsita barnafrádrátt við ymiskum frádrátti fyri børn undir 7 ár og børn millum 7 og 17 ár. Sí 2.1 omanfyri.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar við sær fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Hækkaði barnafrádrátturin hevur ongar beinleiðis avleiðingar við sær fyri vinnuna. Tó kunnu hækkaði barnafrádrátturin og harvið lægri skatturin viðvirka til betri kappingarføri um arbeiðsmegina.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við sær fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar við sær fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið fer at lætta um fíggjarliga hjá smábarnafamiljum. Barnafrádrátturin hækkar 2.700 kr. árliga fyri hvørt barnið, sum er undir 7 ár. Smábarnafamiljur eru millum tey, ið hava trongastu fíggjarligu korini. Tí fer hækkaði frádrátturin at vera við til at býta virðini javnari í samfelagnum. Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Nevndur kann verða ST-sáttmálin um rættindi hjá børnum. Uppskotið samsvarar fult og heilt við ST-sáttmálan um rættindi hjá børnum. Aðrir millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Í uppskotinum er einki, sum ikki samsvarar við Europeiska Mannarættindasáttmálan ella ST-sáttmálan um rættindi teirra, ið bera brek. Á sama hátt er einki í uppskotinum, sum ikki samsvarar við ST-sáttmálan um rættindi hjá børnum. Hetta eru tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum Føroyar hava bundið seg til at fylgja.

2.9. Marknaforðingar

Kendar marknaforðingar eru ikki á økinum, og uppskotið verður ikki mett at hava marknaforðingar við sær.

2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hækkar skattafrádráttin í landsskattinum fyri børn undir 7 ár. Harvið lækkar netto-skatturin fyri smábarnafamiljur.

2.12. Gjøld
Í lógaruppskotinum eru ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu, krøv um loyvi ella annað.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við broytingini verður barnafrádrátturin í landsskattinum fyri børn undir 7 ár hækkaður úr 6.500 kr. upp í 9.200 kr.

Barnafrádrátturin í landsskattinum fyri tey eldru børnini (millum 7 og 17 ár) verður óbroyttur.

Avgerandi fyri, um hægri ella lægri barnafrádrátturin verður galdandi, er aldurin á barninum 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur.

Til § 2
Áseting um gildiskomu av løgtingslógini.

Fíggjarmálaráðið, 22. juli 2016

Kristina Háfoss
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason
aðalstjóri

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælissvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 3: Ummælissvar frá Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 4: Ummælissvar frá Vinnuhúsinum